# Egil Reyði - kundi blivið størsta føroyska vannlukka

**Á vitjanini í Neskaupstaði fingu føroyingarnir høvi til at heilsa uppá gamlar íslendskar trolaramenn, sum høvdu siglt saman við føroyingum**

### Teir vóru

- Birgir Sigurðsson, sum var dekkari á Egil Reyða, stýrimaður á Goðanesi og stýrimaður og skipari á Gerpi.
- Herbert Benjamínsson, sum var bátsmaður á Egil Reyða, Goðanesi og Gerpi.
- Axel Óskarsson, sum var telegrafistur á Egil Reyða og Goðanesi. Hann upplivdi bæði forlissini
- Halldór Thorsteinsson, sum var dekkari á Gerpi
- Jakob Vigfússon, sum eisini var dekkari á Gerpi

### Stóð eisini á hjá Gerpi

Birgir Sigurðsson var beiggi skiparan á Goðanesi, sum doyði á Flesjunum. Hann er eisini pápi Karl Johann Birgisson, sum skipaði fyri vitjanini í Neskaupstaði.

Birgir er nú 80 ára gamal. Hann er ein royndur trolaraskipari og var til skips, inntil hann var 70 ára gamal. Hann hevur somuleiðis upplivað eitt sindur av hvørjum. Hann var skipari á fyrsta sinni við trolaranum Gerpi í 1959. Teir vóru á veg til New Foundland og sigldu fram við Kappanum í illveðrinum, tá ið Hans Hedtoft gekk burtur. Teir fingu ein sjógv, sum gjørdi skaða á brúnna, men teir kundu tó halda áfram.

Tað var beint eftir Hans Hedtoft vanlukkuna, at íslendski trolarin Juli koppaði av yvirísing og sakk. 30 mans, teir nógvu av Hafnarfjørðinum, fórust. Gerpir var á somu leið.

Gerpur var tann trolarin, sum Bæjarútgerðin í Neskaupstaði útvegaði sær sum nýbygning fyri Egill Rauða.

Birgir hevur siglt saman við nógvum føroyskum fiskimonnum, sum hann gevur besta skoðsmál. Hann kendi eisini fleiri av teimum gomlu føroysku trolaraskiparunum sum Hans Paula og Kaj Johannesen.

Kona Birgir, Guðriður, er av føroyskari ætt. Abbi hennara var Jógvan Hjelm úr Vági, pápabeiggi kenda skiparan Thorvald Hjelm.



Helst føroysk manning. Ber nakar kenslu á hesar?

### Vanlukkan við Egil Reyða

Vanlukkan við Egill Rauði var nógv kend í síni tíð. Manningin taldi 34 mans, og av teimum vóru sum nevnt 19 føroyingar. Teir byrjaðu ein nýggjan túr nýggjársdag í 1955. Tann 26. januar var av ringasta veðri uppi á Vestfjarðunum, sum er nærmasta land til fiskileiðina á Halanum, tiltikið sum eitt illveðursøki, sum føroysk fiskiskip eisini hava royndir av. Hetta er ikki minst galdandi um veturin, tá ísingin av skipunum ger tey til eina deyðsfellu. Her eru eisini mong skip burturgingin.

Júst hendan dagin frysti 14 stig. Hvussu harðbalið tað kundi vera, kom júst til sjóndar hendan dagin. Tað fyrsta, sum hendi á degnum var, at tveir bretskir trolarar fórust við ikki færri enn 50 monnum.

### Neyðarkall av Egill Rauða

Mikudagin tann 26. januar kl. 18.45 hoyrdu teir á trolaranum Austfirðingur neyðarkall frá Egill Rauða, sum segði seg vera strandaðan innarlaga við Grønulíð ikki langt frá Ísafjørðin. Tað var longu blivið myrkt, og tað var av ringasta veðri. Egill Rauði hevði - eins og onnur skip - leitað sær inn undir land at kroka. Skiparin var í messuni og skaffaði, og tað stoytti í somu løtu, sum hann var komin upp á brúnna aftur. Tað var ein skopuningur, sum tá stóð til róðurs. Men hann gjørdi sjálvtsagt bert tað, hann hevði fingið boð um.

Vegna umstøðurnar vistu teir á Egili Reyða ikki heilt nágreiniliga, hvar skipið var strandað.

Sambandið við skipið hvarv longu kl. 19.30, tí sjógvur var komin at telefonini. Nógvir trolarar fóru at leita eftir Egill Rauða, men illa gekk at finna hann vegna myrkur, kavarok og illveður. Manningin hevði roynt at skjóta rakettir og at blussa, men hetta hevði ikki riggað vegna tað vánaliga veðrið og kavarokið.

Men kl. 21 funnu trolararnir Egill Rauða. Tað var sera óreint í sjónum, og tí kundu trolararnir ikki koma nóg nær til at kunna skjóta bjargingarlínu yvir á Egill Rauða. Bjargingarbátarnir hjá trolarunum vórðu settir út, og teir royndu at koma tað nærri strandaða trolaranum, men hetta riggaði heldur ikki.

Kl. 21 fór eitt bjargingarlið við 10 monnum av Ísafirði við einum báti, og komu teir fram kl. 23.30. Tá var staðið, har trolarin var strandaður, upplýst av ljóskastarum frá trolarum, sum vóru komnir hagar. Men bjarging frá sjónum tyktist ikki at vera møgulig sum var.



*Norðfjørður var ein góð havn, har tað eisini komu nógvar føroyskar sluppir*



*Føroyskar sluppir á Norðfirði*

### Bjargingarlið mátti ganga í 9 tímar

Tá fóru menn at hugsa um møguleikan at bjarga monnunum frá landi, hóast vegurin higar tyktist at vera ófarbarur. Hóast hetta varð eitt lið av bjargingarmonnum sent avstað frá Ísafirði. 10 mans av trolaranum Austfirðingur skuldu vera teimum til hjálpar saman við stýrimanninum á vaktarskipinum Ægir.

Har trolarin stóð, bar als ikki til at seta fólkið á land. Tað nærmasta staðið, bjargingarmenninir kundu verða settir á land, var á Hesteyri, sum er so langt burturi, at tað tók 9 tímar at ganga. Tað var eisini sera illgongt, eins og tað eisini mátti gangast um fjøll, og hetta var í ringastu veðurlíkindum. Vegvísari teirra var ein ungur drongur, Gisli Jónsson, bóndasonur har á leiðini, sum var tann einasti, sum var staðkendur. Bóndagarðurin var niðurlagdur, og familjan var flutt til Ísafjørðin. Tað var so heppið, at bjargingarliðið hitti hann tilvildarliga í býnum á veg í biograf, tá tað skuldi fara avstað. So Gisli hevði bert at skunda sær at lata seg í til ferðina, og so at fara við. Teir fóru til gongu við útgerð kl. 5 um morgunin, og teir komu ikki fram fyrr enn kl. 1 seinnapartin.

Men nakað samstundis fóru tveir bátar avstað frá Ísafirði, og vóru hesir Andvari og Páll Pálsson. Hetta vóru 15-16 tons bátar. Hildið var, at hesir bátar vóru so passaligir í støðd, at teir kundu koma so nær Egill Rauða, at teir kundu skjóta línu umborð. Ein av teimum trolarunum, sum vóru komnir til hjálpar, var Goðanes, og skiparin á honum fór umborð á Andvari fyri at hjálpa teimum at skjóta línuna yvir á Egill Rauða. Siglt varð so nær boðunum sum gjørligt, og síðani varð roynt at skjóta bjargingarlínu yvir á neyðstadda trolaran.

Kl. 9.10 var farið at lýsa fyri degi, og nú skuldi hetta roynast. Tá sást eisini, at skipið var brotnað av um miðjuna, og brimið skolaði yvir báðar partarnar av skipinum. Roynt varð at skjóta fleiri ferðir, og fjórða skotið eydnaðist. Kl. 10.15 var fyrsti maðurin hálaður yvir á Andvari. Tá vóru lidnir 15 ½ tími síðan strandingina. 13 mans vórðu bjargaðir umborð á Andvari. Hesir vóru allir sera illa fyri, sum teir illa klæddir og oljudálkaðir vóru drignir langan tein gjøgnum sjógvin.

### Bjargingin frá landi

Bjargingarmenninir á landi komu fram kl. 13. Hetta var fyrstu ferð, at walkie-talkie hevur verið brúkt í eini slíkari støðu. Teir royndu eina ferð at fáa samband við bjargingarfólkið á sjónum, men teir fingu ikki samband. Hetta var heppið, tí høvdu teir tá fingið at vita, at bjargingini var byrjað frá sjónum, høvdu teir helst vent aftur. Tað er als ikki vist, at tað tá hevði gingist so frægt at bjarga fólkinum, sum tað gjørdist.

At fáa fólkið í land var nógv skjótari, tí vrakið var heilt nær landi. Hetta var eisini nógv lagaligari fyri fólkið. Bjargingin frá sjónum varð

Framhald á síðu 34